# Bogi bergtók

**Meðan vinnulívsfólk, politikarar, fjølmiðlafólk og onnur leitaðu sær inn til stóru altjóða ráðstevnuna, vísti stórskermurin í høllini í Norðurlandahúsinum livandi myndir tiknar beint undir vatnskorpuni – kanska fyri at skapa rætta huglagið frá byrjan. Høvuðspersónurin á ráðstevnuni, nobelvinnarin og fyrrverandi varaforsetin í USA, Al Gore, var ikki hjástaddur, men tað man vera lítil ivi um, at hann hevur tryggjað part av stóru luttøkuni á ráðstevnuni.**

**Stjørnan hendan fyrrapartin var tó eingin útlendingur, men okkara egni Bogi Hansen, havfrøðisgranskari. Eftir at Kjartan Hoydal, skrivari hjá NEAFC og leiðari fyri ráðstevnuna, hevði bjóðað vælkomin, Marita Rasmussen, forkvinna í Arbeiðsgevarafelagnum, og Helena Dam á Neystabø, Landstýriskvinna við ábyrgd fyri umhvørvismálum høvdu stuttar hugleiðingar, kom Bogi Hansen á pall, og við einari greiðari, hugtakandi framløgu greiddi hann frá, hvussu havumhvørvið við Føroyar hevur týdning fyri alla verðina.**

**dh**



*Al Gore við fylgi úti á Tinganesi – tað var ein serstakliga styggur varaforseti, sum hitti føroysku heimspressuna í dag. Úti á Tinganesi vitjaði hann løgmann, Helenu Dam á Neystabø og Høgna Hoydal. Men hann hevði ikki eitt orð til yvirs fyri føroysku pressuni annars*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




## Kjartan Hoydal

**Um somu tíð sum verðin misti dinosararnar, vórðu Føroyar til, og hetta var kanska ein ikki so galin býtishandil, helt Kjartan Hoydal, skrivari í NEAFC og leiðari av ráðstevnuni, skemtandi fyri, tá hann bjóðaði vælkomin til ráðstevnuna. Hann fegnaðist um, at Føroyar á hendan hátt rætti heiminum hondina og vísti vilja at geva og taka ímóti umhvørviskunning**

*Mynd: Finnur Justinussen*




## Marita Rasmussen

**Marita Rasmussen, forkvinna í Arbeiðsgevarafelagnum, sum hevur skipað fyri ráðstevnuni saman við Bitland, Samvit og Nora, staðfesti, at vinnan eisini hevur ábyrgd fyri at taka umhvørvisspurningin í álvara og skipa fyir einum slíkum tiltaki sum hesum.**

**- Vit mugu vísa heiminum, at vit eru til reiðar at vera virkin fyri at verja umhvørvi, segði Marita Rasmussen**

*Mynd: Finnur Justinussen*




## Helena Dam á Neystabø

**Landstýriskvinnan í lógarmálum, sum hevur ábyrgd fyri umhvørvismálum, lovaði at samgongan tekur umhvørvistrupuleikan í størsta álvara og ætlar at seta ítøkilig átøk í verk.**

**- Eg vóni at hetta verður okkara útpurring, soleiðis at vit í staðin fyri ábyrgdarleysa troyting fáa skilagóða**